Veist tú eina søgu, so SMS'a á 285004

# Bøta um parkeringinga

Seinasta asfalteringsarbeiðið verður nú gjørt á nýggja parkeringsøkinum millum bátabrúgvarnar og Nólsoyarpálsgøtu í Klaksvík. Gongst sum ætlað, verður parkeringsøkið liðugt um fáar dagar, har økið eisini verður skipað við vegstrikum og parkeringsbásum, ið verða munandi fleiri enn frammanundan.

Norðan fyri parkeringsøkið liggur nýggi FK-handilin, eystan fyri Nólsoyarpálsgøtu eru fleiri handlar, og sunnan fyri parkeringsøkið liggur bensinstøðin og krambúðin hjá Effo, sum í løtuni verður dagførd og útbygd.

# Hólmgonga millum Sjúrð og Flóvin

MFS í Keypmannahavn bjóðar í annaðkvøld til hólmgongu millum Sjúrður Skaale og Flóvin Eidesgaard í Føroyahúsinum.

– Vit vænta okkum eina sanna orrustu, tá teir báðir garparnir Sjúrður Skaale og Flóvin Eidesgaard hittast til hólmgongu í Føroyahúsinum. Evnið "Eru Føroyar um at drukna í fólkaræði" fær sanniliga glið á teirra oftast vælvaldu orð, sigur MFS um tiltakið.

Tiltakið byrjar kl. 19.00 og Høgni Reistrup spælir eftir tiltakið.



# Matiné í Havnar kirkju

Í morgin, leygardagin 19. mars klokkan 11.30 verður matiné í Havnar kirkju við klaverleikaranum Kim Kristensen og slagverksleikaranum Rógvi á Rógvu. Teir eru báðir lærarar á rytmisku deild á Tórshavnar musikkskúla og spæla javnan saman í ymiskum høpum.



# Heðin í Galerie Focus

Í dag klokkan 16 verður fernisering í Galerie Focus í Havn. Tað er fuglfirðingurin Heðin Kambsdal, sum sýnir fram. Framsýningin er opin frá 18. til 31. mars – týsdag til fríggjadag frá klokkan 15 til 18, leygardag frá 16 -til 18

# 2203 vilja hava Framsókn at stilla upp

**POLITIKKUR Í gjárkvøldið taldu Hanna Jensen og Poul Michelsen undirskriftirnar, sum longu eru sendar kommunum til góðkenningar**




*Hanna Jensen og Poul Michelsen eru enn einastu andlitini handan nýggja flokkin, Framsókn*

Mynd: Jens Kristian vang

Eirikur Lindenskov

– Vit eru glað, tí vit hava fingið sera nógvar undirskriftir. Vit vita væl, at øll, sum skriva undir, ikki fara at atkvøða fyri flokkinum, men vit merkja, at vit hava fingið sera góða móttøku, sigur Poul Michelsen, stigtakari til nýggja flokkin Framsókn.

Í gjárkvøldið taldu Poul Michelsen og Hanna Jensen, sum hava tikið stig til nýggja flokkin, Framsókn, allar undirskriftirnar, sum savnaðar eru inn til at stovna nýggja flokkin. Úrslitið var 2203 undirskriftir.

Tær skulu allar sendast til tær kommunurnar, har fólkini búgva. Síðani skal fólkayvirlitið á staðnum vátta, at fólkini veruliga eru til. Tá tann góðkenningin er komin, fær Framsókn undirskriftirnar aftur og skulu tær so berast út í Tinganes, áðrenn løgmaður kann geva flokkinum formligt loyvi at stilla upp.

– Hesa tíðina, til endaliga góðkenningin fyriliggur, fara vit at fyrireika flokkin. Vit hava nøkur fólk afturat okkum, vit fara at gera stevnuskrá o. s. fr. sigur Poul Michelsen.

Eini 200 fólk hava savnað undirskriftirnar kring landið. Tey hava fingið fólk úr 22 kommunum at skriva undir at flokkurin sleppur at stilla upp, og sambært Poul Michelsen hava tey fingið nógvar positivar afturmeldingar, so Poul Michelsen og Hanna Jensen eru við gott mót.

eirikur@sosialurin.fo

Veist tú eina søgu, so SMS'a á 285004

# Astri Luihn í Listaglugganum

**FRAMSÝNING Framsýningin, ber heitið »Í grønu torvu«, læt upp í gjár**

Eirikur Lindenskov

Hósdagin læt ein framsýning upp í Listaglugganum, Dr. Jakobsensgøta 15, við málningum eftir Astri Luihn. Framsýningin ber heitið »Í grønu torvu«. Tað eru umleið 20 málningar við á framsýningini.

Tað er í hesum føri eisini fjølbroytni í náttúruni, sum hugtekur Astri – serliga fuglabergið og bjargalendi yvirhøvur.

Í bókini Astri Luihn, sum Bente Scavenius hevur skrivað, verður millum annað sagt:

»Í fleiri ár kendi eg náttúruna einans gjøgnum teir føroysku málararnar og teirra málningar, ið mangan vóru sera ekspressivir. Nú havi eg fleiri ferðir av egnum royndum upplivað fjølbroytnið í tí føroysku náttúruni, men enn er tað ígjøgnum eyguni á málarunum, at eg upplivi vakurleikan og fjølbroytni. Tað eru málararnir, ið hava givið mær lykilin til tey mongu hugløg og litir í landslagnum. Og tá ið talan er um fuglabergið, er tað ígjøgnum tær mongu, sansaðu myndirnar hjá Astri Luihn, at eg havi lært um bjargalendið og tess serligu eyðkenni, og ikki minst havi eg fingið kunnleika til livihátt lomvigans og hugtakandi lívsmynstur hansara.«

Framsýningin »Í grønu torvu« verður at síggja í Listaglugganum næstu 14 dagarnar, týsdag-fríggjadag kl. 15.00 – 17.30 og leygardag kl. 11.00 – 14.00.

